# Hósdagur 20. juni

## SVF

18.30 Heidi og fjallaabbin 1:26
19.00 Borð um borð 5:7 e
20.00 Dagur og Vika
20.20 Dreingirnir úr Ramallah
20.50 Sálin á ranguni 4:6
21.20 Ally McBeal
22.05 Krimitímin: Undir illgruna 4
23.45 Liðugt

## EUROSPORT

08:00 Sailing: Sailing World
09:00 Sailing: Volvo Ocean Race
09:30 Football: Danone Cup
10:00 Superbike: Superbike Mag
10:30 Motorsports: Series
11:30 Football: Inside The Teams
12:00 Football: World Cup Classics
13:30 Tennis (Live): Atp Tournament 'S Hertogenbosch Netherlands
17:00 Tennis (Live): Wta Tournament Eastbourne United Kingdom
18:00 Tennis: Wta Tournament Eastbourne United Kingdom
19:00 Football: Inside The Teams
21:00 Boxing: Heavyweight Explosion Las Vegas
22:00 Football: Inside The Teams
22:15 News: Eurosportnews Report
23:15 Football: World Cup Classics
23:30 Football: Asian Culture Cup
00:30 Football: Inside The Teams
00:45 News: Eurosportnews Report
01:00 Football: Asian Culture Cup

## BBC PRIME

0.00 TLZ: »Ancient Voices – Cahokia – America's Lost Metropolis«
1.00 TLZ: »Century in Motion«
1.30 TLZ: »Century in Motion«
2.00 TLZ: »Castaway – Rough Science«
2.30 TLZ: »Sounds – What have the 90's ever done for us?«
2.40 TLZ: »Mind Bites«
2.45 TLZ: »Talks – Background Brief - The Science of Stress«
3.00 TLZ: »The Lapedo Child«
3.50 TLZ: »Sounds – What have the 80's ever done for us?«
4.00 TLZ: »Tales from the Global Economy – The Cappuccino Trail«
4.40 TLZ: »Science in Action – Cells«
5.00 Susanne
5.30 English Zone
6.00 Smarteenies
6.15 Bits & Bobs: »Clown«
6.30 Yoho Ahoy: »Up«
6.35 Toucan Tecs: »Crazy Golf«
6.45 Playdays: »Dot Stop«
7.05 Bright Sparks
7.30 Kitchen Invaders
8.15 Real Rooms: »Fritwell School«
8.45 Going for a Song
9.15 Battersea Dogs Home
9.45 Police Dog Academy
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »The greatest Show in the Galaxy«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Miss Marple: »The Moving Finger« - Part One
13.30 Kitchen Invaders
14.15 Smarteenies
14.30 Bits & Bobs: »Clown«
14.45 Toucan Tecs: »Crazy Golf«
14.55 Playdays: »Dot Stop«
15.15 Totp Eurochart
15.45 All Creatures Great & Small: »Food For Thought«
16.45 Ainsley's big Cook out: »Argentina«
17.15 Gardeners' World
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 2 Point 4 Children: »Frenzy«
20.00 Jonathan Creek: »The Wrestler's Tomb Part«
21.00 Bottom: »Digger«
21.30 Child of Our Time 2001: »The Personality Test«
22.30 Ray Mears' Extreme Survival: »Sahara«
23.00 Casualty

## BBC WORLD

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Holiday (r)
02:00 BBC News
02:30 Aliyah (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk
05:00 BBC News
05:30 World Business Report
06:00 BBC News
06:30 World Business Report
07:00 BBC News
07:30 World Business Report
07:45 Sport Today
08:00 BBC News
08:30 Holiday (r)
09:00 BBC News
09:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Aliyah (r)
11:00 BBC News
11:30 Asia Today
11:45 Sport Today
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Top Gear (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Panorama
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

## TV3

04:50 garfield og venner (17)
05:15 børnehjørnet
07:00 tv-shop
08:50 lassie på nye eventyr (35)
09:15 ricki lake (1045) (g)
10:10 horton-sagaen (1241) (g)
11:00 horton-sagaen (1242)
11:55 once & again (33)
12:50 family law (25)
13:50 livet i vildmarken
15:35 blossom (34)
16:05 ricki lake (1046)
17:00 alle elsker raymond (101)
17:30 vild med dig (120)
18:00 sjov og spas (48)
18:30 alle tiders barnepige (25)
19:00 skadestuen (175)
20:00 silencing mary
21:45 the guardian (13)
22:45 seinfeld (55)
23:15 simpsons (147)
23:45 ti tommelfingre (52)
00:15 walker, texas ranger (34)
01:15 nash bridges (17)
02:15 træneren (85)
02:45 træneren (86)
03:15 sunset beach (332)
04:05 herkules - de unge år (35)
04:30 godnat

## ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur - Hans Jacob Sigvardsen, á Argjum, lesur
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar - Kári Olsen er vertur
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Hans Jacob Sigvardsen, á Argjum, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 1
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm er vertur
11.00 Tíðindi
11.03 Faktor fimm (e) - Lættur summartónleikur hjá Gunnari Nolsøe
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 15 tær bestu (e)
15.00 Tíðindi
15.03 Barometrið - Rúni Jákupsson, Bjarni Mohr og Kári Sólstein leggja til rættis
16.00 Tíðindi
16.03 Barometrið
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum - Símun Jóannesarson Hansen stílar fyri
18.00 Barnaútvarpið - Jonna og Katrin stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
18.50 HM í fótbólti
19.00 Garpatáttur - Hans Tórgarð lesur 2. part av skaldsøgu eftir Halldór Laxness, sum Tóra Tóroddsdóttir og Martin Næs hava týtt.
19.30 Krás - Tónleikasending hjá James Olsen
20.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Ginna Midjord leggur til rættis
22.00 Tíðindi

## Dreingirnir úr Ramallah

SVF Hóskvøldið kl. 20.20

Teir eru palestinar og teir eru uppvaksnir í landi, sum Ísrael hevur hersett. Vit hitta nakrar av dreingjunum á virðisløntu myndunum av steinandi børnum úr Ramallah, sum er ein býur á hersetta vestara áarbakka. Danski fortografurin Jan Grarup tók myndirnar.
*Lagt til rættis: Anne Lea Landsted.*

## Silencing Mary




Holly, ein lesandi á lærdum háskúla, verður neyðtikin. Neyðtakarin er ongin minni enn stjørnan á liðnum hjá skúlanum. Sjálvt um Holly verður plágað, syrgir vinkona hennara, Mary fyri, at gerningsmaðurin ikki sleppur óskalaður frá tí hann hevur gjørt.
*Leikandi: Melissa Joan Hart, Lisa Dean Ryan , James McDaniel . o.o.*
*Leikstjórn: Craig R. Baxley.*

## ÚF Morgunlestrar
### 10.–15. juni

***Hans Jacob Sigvardsen á Argjum lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**
**Mánadagin 17. juni:**
nr. 159 »Guð sjálvur hevur plantað«
Luk. 14,33
nr. 257 »Arbeið, tí náttin kemur«

**Týsdagin 18. juni:**
nr. 546 »Sí, úr havi rísur nú morgunsól«
Fyrra kor. 15,55
nr. 407 »Jesus góði, ver tú mín«

**Mikudagin 19. juni:**
nr. 197 »Sum vársól rísur yvir fold«
Luk. 14,35
nr. 195 »Deyði, hvar er nú broddur tín«

**Hósdagin 20. juni:**
nr. 48 »Lítla Guðs barn, hvat sakar teg«
Gal. 6,2
nr. 315 »Givnir eru einglar góðir«

**Fríggjadagin 21. juni:**
nr. 516 »Ljósið rann av kærleiks runni«
Áps. 9,4
nr. 269 »Hvat er tað, sum tyngir sinnið«

**Leygardagin 15. juni:**
nr. 54 »Tú fylgdi mær fyrst tá í vøggu eg lá«
nr. 406 »Bið, o, Jesus, fyri mær«

## Rás 2

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár. - Innsløg, prát og tónleikur. - Sonne Smith og Annika B Mortensen leggja til rættis.
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:30 Ynskiløtan - Heilsanir frá lurtarum. - Send heilsanir um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi og kunngerðir
15:15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur. - Sonne Smith og Annika B Mortensen leggja til rættis.
16:00 Tónleikur
17:00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. - John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
18:00 Tíðindi og kunngerðir
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Jeremias profetur (9. partur av 12). - Zacharias Zachariassen leggur til rættis.
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og kunngerðir
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. - Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

## Lindin

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
15.00 Horizon Star v/Stellu Zachariassen
16.30 Summartónar v/Sólbjørg Zachariassen
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana. Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379.
00.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti.
02:00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e)
03.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
06.00 Vit gevast



EYSTANSTEVNAN 2002

# Hin burturfarni sonurin á eystanstevnu



*Meinhard Bjartalíð, sóknarprestur, fer at prædika á Glyvra kirkju sunnudagin, og teksturin verður um hin burturfarna sonin. - Faðirin í líknilsinum er eingin annar eg Guð, og líknilsið sigur okkum eisini, at tú kanst ongantíð gera teg verdugan til Guðs náði, sum er kærleiksfull - og ókeypis, sigur sóknarpresturin*

**- Tað er altíð soleiðis, tá ið tú prædikar, at tú roynir at gera tekstin viðkomandi, men sunnudagin verður tað ein kjarnutekstur, eg fari at prædika yvir, sigur sóknarpresturin, Meinhard Bjartalíð**

GUÐSTÆNASTA
*Vilmund Jacobsen*

Sunnudagin kl. 11 verður guðstænasta í Glyvra kirkju við Meinhardi Bjartalíð, sóknarpresti.

Vit spurdu Meinhard týsdagin, um hann fer at tvinna stevnutiltakið uppí taluna hendan dagin, nú eystanstevna er, og guðstænastan er við í skránni fyri stevnuna.

Meinhard heldur ikki, at tað er so vanligt at gera nakað serligt burtur úr sjálvum stevunum í prædikum uttan, tá ið ólavsøka er.

- Enn er bara týsdagur, so hetta havi eg ikki hugsað so nógv um. Men nú fáa vit at síggja, um stevnutiltakið verður tikið fram í prædikuni. Tá ið nomið verður við slík tiltøk í eina prædiku, er umráðandi at gera sær nakrar tankar í góðari tíð og festa teir á blað. Tað havi eg ikki gjørt, sigur presturin.

### Burturfarni sonurin

Men Meinhard lovar undir øllum umstøðum, at teksturin sunnudagin verður áhugaverdur, tí hesaferð snýr hann seg um tey trý líknilsini í Lukasi, kap. 15, har hæddarpunktið er søgan um hin burturfarna sonin.

- Søgan um hin burturfarna sonin er samstundis hæddarpunktið í evangeliinum eftir Lukas, og eg haldi ikki, tað er av tilvild, at hesin parturin er plaseraður mitt í evangeliinum. Í mínari verð er eingin ivi um, at Lukas, sum var lækni, sjálvur hevur hildið hetta líknilsi vera tað besta.

Meinhard sigur, at Lukas verjir Jesus við líknilsinum um burturfarna sonin. Hann er fyri veldugum atfinningum av farisearum og skriftlærdum, tí hann hevur borðfelagsskap við tollarar, syndarar og skøkjur.

- Hesi líknilsi, sum eru í Lukasi, kap.15, hevur Jesus sitið og fortalt við borðendan og hevur víst á, at evangeliið ikki minst er vent móti teimum, sum eru uttanfyri - um vit kunnu siga tað soleiðis, sigur presturin.

### Kærleiksfullur faðir

Hann vísir á, at hetta er evangiliið um hin kærleiksfulla faðirin, sum treytaleyst tekur ímóti soninum, sum er vendur heimaftur.

- Faðirin í líknilsinum er eingin annar eg Guð, og líknilsið sigur okkum eisini, at tú kanst ongantíð gera teg verdugan til Guðs náði, sum er kærleiksfull - og ókeypis.

Presturin heldur, at líknilsið um burturfarna sonin er velduga flott - ein perla í litteraturinum, sum hann tekur til.

- Tað er altíð soleiðis, tá ið tú prædikar, at tú roynir at gera tekstin viðkomandi, men í hesum førinum er hetta ein kjarnutekstur at prædika yvir, sigur hann.

Meinhard Bjartalíð sigur at enda, at hann fyrst og fremst fer at halda seg til tekstin til komandi sunnudag og torir ikki at lova, at hann fer at tvinna stevnutiltakið, sum annars er í kommununi hetta vikuskiftið, uppi í prædikuna.

---

*Framhald av síðu 11*

fara undir, men koma at enda undan aftur "hinumegin", kanska fleiri ár seinni. Í flestu førum lata danir ikki sandin eta seg inn í landið, men Råbjerg Mile er eitt stað, sum danir vilja hava soleiðis til tess at vísa ferðafólki, sum vilja síggja, hvussu náttúran háttar sær, um hon fær frið. Hetta er faktisk ein lítil oyðimørk mitt í eini skóg, um tað ikki er ov nógv sagt, sigur Magnus.

Tann eina dagin slapp ferðalagið at sigla í kano omaneftir eini á í einar 2-3 tímar. Tey komu í land aftur í Uggerby.

Ein annan dagin vitjaðu tey í Skagen og sluppu heilt norður á Grenen, hagar tey vórðu drigin við einum traktori.

Magnus sigur, at onnur støð, tey vitjaðu, var Fårup Summerland og Farm Fun, sum er ein stuttligur bóndagarður; har hugnaðu tey sær og høvdu tað stuttligt.

### Framsýning

Øll vóru sera fegin um túrin, og síðan skúlaflokkur, lærarar og foreldur komu heimaftur, hava næmingarnir arbeitt við tilfarinum frá ferðini. Tey fara at skipa tilfarið, sum er myndir og annað frá ferðini, sum eina framsýning, ið verður sýnd fram í Glyvra skúla fyri foreldrum og hinum næmingunum á skúlanum.

- Foreldrakvøld verður mánakvøldið, og tá fer henda framsýning av bakkastokki, sigur Magnus.

Hann heldur ikki, at nakar ivi er um, at ferðalagið úr Runavíkar kommunu á ferðini í Danmark heystaði fruktirnar av, at føroyska og danska kommunan hava vinarbýarsamstarv, so blíð og fyrikomandi sum tey vóru í Hirtshals og allastaðni har á leiðini.

- Leggjast kann aftrat, at bæði kommunan her á staðnum, skúlin og foreldur hava stuðlað okkum væl til hesa ferðina - øll á ymiskan hátt, sum gjørdi tað møguligt hjá okkum øllum at fáa ein so avbera góðan túr í Danmark, sigur Magnus Rasmussen, lærari.



*Hetta er 6c í Glyvra skúla, sum vitjaði í Hirtshals um mánaðarskiftið, mai/juni*